













# Hugnalig sethús á Signabø

Talan er um eini sera hugnalig og góð hús á Signabø. Tú verður ovfarin – nærum tikin á bóli, tá tú kemur afturum húsini. Her er ein ótrúðliga vakur og vælhildin urtagarður við fleiri vøkrum blómubedum, ein deiligur sólkrókur, har møguleiki er fyri at hava havamøblarnar standandi og sólin skínir langt út á kvøldið. Grundøkið er stórt, 589 fermetrar, og hevur tú nógvar møguleikar fyri at planta fleiri trø, runnar ella bara at brúka økið til tað, tær tøvar.

Húsini standa væl fyri á Signabø við góðum útsýni. Her er friðarligt og barnavinarligt. Sparkivøllur og bátahylur er á Signabø. Skjótt er til vøggustovu og barnagarðarnar í Kollafirði og eisini koyrir skúlabussurin til skúlan í Kollafirði.

Stílurin í húsunum er hugnaligur og romantiskur. Rúmini eru ljós, rúmlig og funktionel og alt er so lætt og ljóst.

Húsini eru í trimum hæddum. Í miðhæddini er durur, gongd, køkur og stova. Í durinum eru flisar á gólvinum við hita. Køkurin er ikki nútímans, men sera hugnaligur og fjálgur við kolkomfýri.

Á loftinum er eitt nýumvælt baðirúm við brúsu og baðikari. Eisini er ein stór og góð sjónvarpsstova og tvey góð kømur. Sjónvarpsstovan er kombinerað sjónvarpsstova og gestakamar.

Kjallarin er góður og turrur. Hann er deildur í tvey. Helvtin av kjallaranum er vaskirúm við vaski, borði, vaskimaskinu v.m., meðan hin helvtin kann brúkast t.d. sum ein lítil verkstaður ella sum goymslurúm.

Ein stórur og góður hjallur hoyrir til húsini, sum er deildur upp soleiðis, at møguleiki er bæði fyri at turka klæðir og at hanga kjøt o.a. upp.

Tú fært meira at vita um húsini við at ringja til Skyn á tlf. 357400.

**Fakta:**

| | |
|---|---|
| Adr: | á Signabø 14 |
| Byggiár: | 1931 |
| Hæddir: | 3 |
| Stødd innan: | 121 fermetrar |
| Grundøkið: | 589 fermetrar |
| Prísuppskot: | kr. 1.200.000 |

skyn

**Tlf. 357400 · Tórsgøta 16 · www.skyn.fo**